## Merkið roknskaparskjølini við roknskaparári

Nú ið ársskiftið 2022/2023 er beint fyri stavn, verður heitt á stovnarnar, ið senda gjaldstovuni skjøl at bóka, um at gera gjaldstovuna varuga við, hvørji skjøl skulu bókast á fíggjarárið 2022.

Tá ið farið verður um ársskiftið 2022/2023, verður heitt á stovnarnar, ið senda gjaldstovuni skjøl at bóka, um at eyðmerkja roknskaparskjølini við ávikavist "2022" og "2023".

Er rokning, sum viðvíkur 2023, ljóslisin við "GL Date" í 2022 – tí fakturadagfestingin er í 2022 – ber til at broyta "GL Date" til at vera 01-23, so rokningin kortini verður bókað á fíggjarárið 2023. Og umvent - rokning, sum viðvíkur 2022, ljóslisin við "GL Date" í 2023 – tí fakturadagfestingin er í 2023 – ber til at broyta "GL Date" til at vera 12-22 ella 13-22, so rokningin kortini verður bókað á fíggjarárið 2022.